# Nøvn

## Føðingar

3. januar fingu Ragna Juul og Pateh Bah, Tórshavn, eina dóttur. hon var 47 cm long og vigaði 1620 gr.

4. januar fingu Marie L. Christensen og John Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2800 gr.

5. januar fingu Olevina Egilstoft og Rolf Herup Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

6. januar fingu Anna Helena Otthamar og Helgi Elias Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3360 gr.

7. januar fingu Guðrið Leth Ingolvsdóttir og Høgni Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3825 gr.

7. januar fingu Annika H. og Kári Davidsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3716 gr.

7. januar fingu Hansina Debes og Kári Durhuus, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

9. januar fingu Birita Ingolfsdóttir Nybo og Levi Tróndarson Nybo, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4100 gr.

11. januar fingu Jóna Pállsdóttir Jacobsen og Pætur Dam Jacobsen, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

Kunngjørt verður, at

**Sólbjørn Jacobsen**
**fyrrverandi telefonverksstjóri,**
**ættaður úr Fuglafirði,**
**búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
mikudagin 12. januar, 75 ára gamal.

Kistan fer frá Landssjúkrahúskapellinum
leygardagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
sunnudagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Else, Lars, Gunnvá og Lisbeth**

Tey, ið vilja minnast Sólbjørn, kunnu lata Hjartafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

# Sólbjørn Jacobsen deyður

– Eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldið gistir, sigur orðatakið. Og tað kunnu vit sanna, nú Sólbjørn Jacobsen, fyrrverandi telefonverksstjóri er deyður.

Síðsta fríggjadag høvdu vit eina føðingardagsheilsan til hansara í blaðnum, tí hann sunnudagin fylti 75 ár. Og longu nú, bara viku seinni, er hann farin handan sýn – hann doyði brádliga mikukvøldið.

Sólbjørn var fuglfirðingur, sonur Sáru og Edvard Jacobsen, og hann var næstyngstur av fimm systkjum. Tey vóru Mimi, fødd í 1928, Paula, fødd í 1931, Jancy, fødd í 1934,

Sólbjørn, føddur í 1936, og Mikkjal, føddur í 1940.

Sólbjørn var væl útbúgvin. Umframt at hann var sivilverkfrøðingur, so læs hann eisini á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Hann kom á Telefonverkið sum tekniskur stjóri í 1968, og tók við sum forstjóri í 1975, og hann var oddamaður fyri tí sera stóru menningini, sum var innan telefoni í Føroyum ta tíðina.

Sólbjørn Jacobsen hevði stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og hann var tíðum gestur her á redaktiónini – og hann ringdi javnan til blaðstjórarnar við hugskotum ella viðmerkingum til oddagreinar - og hevði altíð okkurt evni, hann helt, at vit áttu at viðgjørt í oddagreinum í blaðnum, sum í mong ár stóð honum nær.

Sólbjørn var limur í búskaparráðnum mong ár, og hann var eisini virkin í Kjølbro fyritøkuni í Klaksvík. Hann var limur í Føroyagrunninum, og hann var eisini okkurt skifti formaður. Seinni var hann eisini formaður í móðurfelagnum JFK.

Sólbjørn var giftur við Else Gotved, sum er ættað úr Keypmannahavn og sum er útbúgvin ergoterapeutur, og eiga tey børnini Lars, sum er føddur í 1963, Gunnvá, fødd í 1966, Lisbeth fødd í 1967.

Friður veri við minninum um Sólbjørn Jacobsen.

# Íbúðir til sinnisveik verða bygdar í Havn

**POLITIKKUR Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, eru samd um fyritreytirnar fyri at byggja íbúðir til sinnisveik við Heygsvegin í Havn, har byggiøki er tókt til endamálið.**

**Eirikur Lindenskov**

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at kommunan tekur á seg at gera eina heildarætlan fyri alt tað stóra økið millum Heygsvegin og sjúkrahúsbygningarnar, so at økið kann fyribils disponerast í mun til framtíðar byggimøguleikar, ferðsluviðurskifti, umhvørvi v. m. Heildarætlanin verður liðug í seinasta lagi 1. mars 2011, og tá eru allar fyritreytir fyri útvegan av byggiloyvum v.m. klárar.

- Bæði Rósa Samuelsen og Heðin Mortensen fegnast um, at byggimálið nú veruliga kann fara í gongd eftir teirri upprunaligu ætlanini. Rósa Samuelsen sigur, at løgtingið skal samtykkja byggiætlanina í vár, og so kann byggingin av íbúðunum til sinnisveik byrja. Í alt er talan um 16 íbúðir, skrivar Tórshavnar kommun.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Temadagur um ta krabbameinsraktu familjuna

Fríggjadagin tann 18. mars 2011 skipar Fakligi áhugabólkurin FÁ2 aftur fyri temadegi fyri fakfólki, sum arbeiðir við krabbameinssjúklingum – hesuferð um tað krabbameinsraktu familjuna.

Tað er psykologurin Bo Snedker Boman sum undirvísir. Hann hevur arbeitt á onkologiskari/hæmato-logiskari deild á Roskilde Sjúkrahúsi í 10 ár, har hann dagliga hevur truplar samrøður við krabbameinsraktar sjúklingar og teirra avvarðandi. Bo Snedker Boman arbeiðir eisini sum privatpraktiserandi psykologur og hevur drúgvar royndir sum undirvísari.

Bo sigur m. a., at teoriurnar um sjúku og familiulív kunnu hjálpa okkum tá vit hava samrøður, men tað er umráðandi at vita, at tað finst ikki eitt svar uppá alt. Vit kunnu ongantíð siga, at nú hava vit loysninaa uppa tað optimalu samrøðuna, tí hvør persónur, og hvør samrøða er serstøk.

Fyrireikari er Fakligi Áhugabólkurin FÁ2 - ein áhugabólkur fyri sjúkraraktarfrøðingar ið starva við krabbamein og AIDS. Bólkurin hevur virkað síðani Januar 1997, og hevur skipað fyri ymsum temadøgum um krabbamein. Temadagarnir hava lutvíst verið fyri sjúkraraktarfrøðingum og lutvíst fyri tvørfakligum luttakarum.